## Fáa ikki vøruna

Íslendskar fyritøkur, sum hava flutt vørur til Íslands við felagnum Atlantsskip, fáa ikki vøruna, sum nú liggur í bingjum á havnarlagnum í Reykjavík. Orsøkin er, at Atlantsskip hevur flutt vøruna við skipum hjá Eimskip, men hevur ikki goldið fyri flutningin. Sambært Morgunblaðnum eigur Eimskip millum 200 og 300 milliónir íslendskar krónur hjá Atlantsakip. Eimskip sigur seg ikki hava heimild til at lata eigarunum vøruna í bingjunum, tí tað skal ganga ígjøgnum Atlantsskip, men tað vil Eimskip ikki gera, fyrr enn skuldin er goldin.

## Uppsagnir hjá Bonnier

Bonnier Publications, sum er største tíðarritútgávufelag í Norðurlondum, kunngjørdi í gjár, at tað hevur gjørt av at koyra 25 medarbeiðarar á høvuðsdeildini í Keypmannahavn til hús. Uppsagnirnar eru lið í einari størri ætlan, sum skal skarva meiri enn 25 milliónir krónur av útreiðslunum. Michael Cordsen, forstjóri í felagnum, sigur í einari fráboðan, at tann stóra fíggjarkreppan hevur gjørt, at inntøkurnar frá lýsingum eru minkaðar umleið 20 prosent, samstundis sum færri bløð verða keypt. Hóast afturgongdina væntar Bonnier milliónaavlop í 2009, men at úrslitið verður lakari enn í fjør.

# 500 tons ígjøgnum um

**Tað er Bakkafrost, sum eigur kryvjivirkið Faroe Salmon Processing í Klaksvík. Har hava tey havt nógv at gera seinastu tíðina, so nógv, at neyðugt hevur verið í tíðarskeiðum at arbeitt seks dagar um vikuna**



LAKSAHAGREIÐING

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*
*myndir: Álvur Haraldsen*

Tað er ein drúgv og umfatandi hagreiðing, ið laksurin skal ígjøgnum, áðrenn hann verður sendur av landinum – ella í summum førum út á Bakkafrost í Glyvrum.

Jóhann Mørkøre er dagligur leiðari á Faroe Salmon Processing, og hevur arbeitt nógv ár í laksakryvjing. Virkið í Klaksvík er ógvuliga framkomið og automatiserað.

Fiskurin kemur til virkið í brunnbáti. Í løtuni verður tikið á Borðoyavík, Hvannasund suður og Árnafirði, og brunnbáturin ger tveir túrar um døgnið.

- Brunnbáturin kemur fyrra túrin klokkan hálvgum trý um náttina við umleið 40 tonsum. Allur fiskurin verður koyrdur í ein brunn uttan fyri, har hann gongur livandi, inn til hann verður tikin inn á virkið klokkan sjey um morgunin, sigur Jóhann Mørkøre.

- Byrjað verður so at blóðga klokkan hálvgum átta, og sjálv framleiðslan byrjar so klokkan átta, sigur Jóhann Mørkøre.

Eftir blóðgingina fer laksurin í eitt bløðikar, har hann liggur í einar tíggju minuttir og bløðir út, áðrenn hann fer víðari í eitt kølikar. Har liggur hann so í 20 minuttir, og er nakað eftir av blóði, bløðir hann tað út har.

- Harfrá fer laksurin so í kryvjimaskinuna, har hann verður kruvdur og reinsaður. Síðani fer hann eftir bandi upp til vrakararnar, sum skilja fiskin í tríggjar bólkar, Superior, Ordinare og Secunda. Haðani fer fiskurin í sonevnda »gradaran«, sum skilir hann sundur. Umleið tveir triðingar fara so út á Bakkafrost, har fiskurin verður skorin í portiónir, meðan ein triðingur verður sendur av landinum, sigur Jóhann Mørkøre.

Laksurin til útflutnings verður síðani pakkaður í flamingokassar, ísaður og avskipaður einar tríggjar ferðir um vikuna, meðan tað, sum fer á Bakkafrost, verður koyrt út har dagliga.

### Arbeiða fast

Jóhann Mørkøre sigur, at meginparturin av laksinum er fyrsta floks, tað, sum verður nevnt Superior.

- Tað eru eini 95% av fiskinum, sum er Superior, so tað er næstan alt. Vit koyra allan Ordinare fiskin út á Bakkafrost til portiónir saman við Secunda fiskinum, sum verður bólkaður í Secunda A og Secunda B, sigur Jóhann Mørkøre.

Tað er sum longu nevnt Bakkafrost, sum eigur kryvjivirkið, og alt, sum verður hagreitt á virkinum er fiskur hjá samtakinum.

- Bakkafrost eigur alibrúk á øllum fírðum í Norðoyggjum, og tað er hesin fiskurin, sum verður arbeiddur her á virkinum. Vit hava fyrr kruvt fyri aðrar, men nógv tann størsti parturin kemur frá okkum sjálvum, sigur Jóhann Mørkøre.

Arbeitt veður ikki í vaktum á virkinum.

- Vit arbeiða bara dagtímarnar, men vit arbeiða nakað yvirtíð eisini. Tað fara umleið 80 tons ígjøgnum um dagin, kanska eitt sindur meiri viðhvørt. Ofta eru vit liðug klokkan 16, men tað kemur eisini fyri, at vit arbeiða yvir nakrar tímar, sigur Jóhann Mørkøre.

Í løtuni verður arbeitt leygardag eisini, so arbeiðsvikan er seks dagar.

- Tað kemst av, at tað er so nógvur laksur at taka í løtuni, og tí dríva vit á at taka, sigur Jóhann Mørkøre.

Tað eru eini 40 fólk knýtt at Faroe Salmon Processing tilsamans, um brunnbáturin verður tikin við.

- Tað arbeiða eini 30-35 fólk á virkinum. Til brunnbátin hoyra fýra mans, sum arbeiða í tveimum vaktum, tveir mans á hvørjari, og teir sigla so eina viku í part, sigur Jóhann Mørkøre.

So at siga øll arbeiðsfólkini eru úr Norðoyggjum, bert onkur einstakur kemur aðrastaðni frá.



*Jóhann Mørkøre er dagligur leiðari á kryvjivirkinum hjá Bakkafrost í Klaksvík*